


*Nr. 25* *14. desember 2014* *74. árg.*

# HVAT ER HETTA FYRI BARN?

*Og sí, tú skalt verða við barn og eiga ein son, og navn hansara skalt tú kalla Jesus.* *Luk. 1,31.*

Spyrt tú mannin á gøtuni, hvørjar hugsanir hann ger sær um barnið í krubbuni, gerst tú bilsin av svarunum. Hygg bara at, hvussu tey svaraðu, sum vóru har, tá ið tað hendi:

Maðurin, sum átti gistingarhúsið, legði líka lag í – har vóru komin fólk til bygdina at verða skrivað í manntal, og hann hevði úr at gera við at sláa upphæddir inn á kassaapparatið. So var tað Heródis – hann royndi at oyðileggja alt, sum hevði samband við jólaveistluna. Og hvussu við hirðunum úti á fløtunum uttan fyri Betlehem? Ikki fyrr enn einglarnir høvdu kýtt seg við at greiða teimum frá hesi himmalsku dýrdini, sum ljómaði rundan um teir, sissaðust teir endiliga.

Vísmenninir vóru forvitnir og fregnaðust bæði her og har, til teir fingu eitt nøktandi svar. Onnur – sum Símeon í templinum - bíðaðu. Uppaftur vóru tað onnur, ið vónaðu – eins og profetkvinnan Anna Fanuelsdóttir. Og so vóru tað tey, ið eins og Maria og Jósef tilbóðu nýfødda kongin.

Ikki er menniskjan broytt stórvegis síðani bíbilsku tíðina, og maðurin á gøtuni svarar næstan á sama hátt sum tá. Ert tú líkasælur eins og gistingarhúseigarin? Hevur tú ov nógv um at vera? Leitar tú enn eftir svari? Ella óttast tú, tí barnið í krubbuni krevur ov nógv av tær? Steðga á og hugsa um, hvat tú hevði svarað, um tú vart maðurin á gøtuni í Betlehem ta náttina.

Tað finnast túsundatals mátar at møta tíðindunum, at ein Frelsari er føddur, sum fríar menniskju frá syndum teirra. Men tað er ein veruleiki, at var barnið ikki føtt, var hesin heimur huldur í svartasta myrkri, glataður og uttan vón.

# Jóladagur – gávan yvir allar gávur

*”… eini STÓR gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið.” Luk. 2,10.*

Mong menniskju eru sorgarbundin um jólini. Rithøvundurin Jon Walker skrivar: ”Eg siti á eini grillbar og hyggi at einari ungari gentu, sum heldur jól eitt sindur upp á forskot saman við mammu sínari. Hennara gávur eru spjaddar út um allan tann lítla básin, tær sita í, og hon sigur: ”Eg sakni teg, mamma.” – ”Eg sakni eisini teg, góða,” sigur mamma hennara. Aftan fyri skilaveggin situr ein kona, still og varin, og hyggur at teimum. Við mínum journalistiska eyga fái eg alt at hanga saman. Konan, sum eygleiðir hinar báðar, er málsviðgeri og hevur eftirlit við einum ásettum møti, har ein mamma og dóttir gera sítt besta fyri at halda jól .. fáar minuttir seinni koma fosturforeldrini og taka ta lítlu gentuna við sær heim. Mamman fer einsamøll avstað.

Tað er ein myrkari síða við jólunum, sum vit sjáldan vilja kennast við. Vit skapa henda dreymin, sum ofta ikki samsvarar við veruleikan … sjálvt í teimum bestu heimunum eru jólini full av spenningi, og ikki bara av einglahári … frítíðin er bara enn eitt høvi hjá mammu at drekka seg fulla, ella hjá pápa at vera saman við teirri nýggju familjuni … og hon er ein áminning um, at tey, vit elska, eru langt burtur og kanska aldri venda aftur. Sjálvmorðslistin er serliga langur í desember, og depressión er líka so vanlig sum ”gleðilig jól”.

Fleiri menniskju, enn vit í fyrsta umfari ímynda okkum, hava tað ringt um jólini. Fyri tey, sum eru móð av tí innanholaðu vónini og teimum følsku jóladreymunum, ljóða tey góðu tíðindini, at ”Gud er við okkum.” Jesus kom til jarðar at geva seg sjálvan til frelsu fyri øll menniskju, og uttan mun til tína støðu, eru jólini tann besta gávan, tú nakrantíð fert at fáa, tí 1) Tað er tað dýrabarasta, tú nakrantíð fert at fáa, tí tað kostaði Jesusi lívið. 2) Tað er einasta gávan, sum heldur um ævir. 3) Tað er ein gáva, sum tú kanst gleðast um restina av lívinum.

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

# Sálarsár

Tíðin lekir sár, ugga menniskju hvørt annað við, og soleiðis er eisini við teim sárum, sum kroppurin fær. Men tey sárini, sum sálin fær, kunnu pína eitt langt mannalív. Læknakynstrið kann grøða mong sár. Nútíðar skurðviðgerð megnar at lekja enntá torførastu sár. Men sálarsár megnar enntá hin dugnaligasti ikki at grøða. Og hesi sárini pína menniskjað mest.

Tey gomlu tosaðu um syndasár. Nútíðar menniskjum dámar onki orðið synd. Synd er bara sálarfløkja siga tey. Men ikki ber til at strika syndina. Hon herjar framvegis mannalívið og særir sálina. Syndasár pína í mong ár, og ongin lækni er førur fyri at grøða tey.

Men sum Irmingard sigur í gyltu halgisøguni Longfellows: “Mín lekidómur varð fyri hvørt skrædl eitt rósublað úr Guds heilagu Skrift.”

Soleiðis játta eisini mong menniskju nú á døgum: ”Eg fekk lekidóm hjá Gudi, í tí heilagu Skriftini møtti eg tí orðinum, sum megnaði at lekja ræðuligu syndasár míni.”

Tað nyttar onki at biðja tann sjúka fara til ein góðan lækna, vil hann ikki gera eftir teimum ráðum, sum læknin gevur honum. Og tað nyttar heldur onki at tosa um at lekja sálarsár, vilja menniskju ikki fara til hin stóra læknan.

Menniskju siga: ”Hasum trúgvi eg ikki. Hatta ljóðar so ótrúligt. Hatta kunnu nútíðar menniskju ikki góðtaka.”

Men hetta er einasti vegurin. Vit kenna ikki læknakynstrið, fyrr enn vit geva okkum í hendur læknans – og sálarsár okkara verður ikki grøtt, fyrr enn vit líta á hin stóra læknan og geva okkum í hendur hansara.

*t.* týddi

# Gleði og kransur

Tað er bara ein gleði, sum varir allar ævir, og sum ber bæði sorg og deyða, og hon er hin stóra gleðin. Sum Gud gav heiminum jólanátt.

Heimurin býður okkum mangar kransar – sí, teir følna allir sum blóma á bøi! Tað er bara ein kransur, sum ongantíð følnar – hann, sum bundin verður úr ævinleikablómum, og sum Gud setir á pannu okkara, um vit eru trúgv at enda.

*t.* týddi.

# Ein einføld bøn

Fyrr á døgum, tá ið ein kristilig veking var í Skotlandi, kom ein ung genta á bygd í syndaneyð. Hon fór til prest at tosa við hann, hvat hon skuldi gera, fyri at hon skuldi verða frelst.

Prestur tosaði vinaliga við hana. At enda ráddi hann henni til at lesa í Bíbliuni og biðja til Guds – so skuldi alt laga seg.

”Ja, men eg dugi ikki at lesa. Eg havi ongantíð lært at lesa, og eg dugi heldur ikki at biðja,” segði hon. Og so suffaði hon av heilum hjarta: ”Harri Jesus, tak og leið meg nú!”

Tá ið Eliza Hamilton seinni hoyrdi hesa lítlu søguna um skotsku gentuna, sum varð umvend, yrkti hon songin , sum vit øll munnu kenna

*”O, Harri Jesus, hoyr nú meg:*
*mítt álit seti eg á teg,*
*tú leið meg á tín himnaveg,*
*o, tak og leið meg nú!*
*Tak og leið meg nú!*
*Tak og leið meg nú!*
*Tak mítt syndatyngda hjarta –*
*tak og leið meg nú!*

*t.* týddi

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14. des. | Tekstur: | Luk. 2,1-20; | bíbliuorð: | Luk. 2,11 |
| 21. des. | Tekstur: | Matt. 2,1-15; | bíbliuorð: | Luk. 2,10 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74




***Nr. 26*** ***28. desember 2014*** ***74. árg.***

# Eitt stórt upplivilsi

Telefonin ringdi, og eg fekk eina heilsan frá einum góðum vini, sum lá sjúkur. Kona hansara segði, at maður sín ógvuliga fegin vildi hava meg at koma at vitja seg, tí hann var so sjúkur. Hugsanirnar bylgdust í sinni mínum, 53 ár og nívdur av krabbameini. Eg hugsaði: Hvat skal eg siga við ein deyðsjúkan mann?

Vit fóru avstað. Kona mín koyrdi, tí eg sjálvur eri sjúkur. Hann lá stillisligur í song síni, og fyrsta, vit komu innum, sóu vit, at hann var deyðamerktur. Meðan vit sita hjá honum, síggja vit, at hann vil siga okkurt.

”Eg havi havt eitt undurfult upplivilsi,” byrjaði hann at siga frá. ”Triðja jóladag misti eg vitið. Eg sá Jesus koma og taka meg. Hann kom í eini stórari eldsúlu, klæðini vórðu fullkomiliga brend burtur av mær, og eg varð latin í ein gyltan klædning og fekk nýggjar skógvar á føturnar.

Tá ið eg var komin inn í himmalin, kom pápi ímóti mær og beyð mær vælkomnum, og eg kendi aftur mong menniskju, sum vóru deyð í trúnni á Jesus Kristus. Tað var undurfagurt í Himlinum, og øll vóru glað, men eg sá eisini menniskju verða koyrd út í eldhavið. Ein stórur skari var savnaður um Jesus, og eg kendi meg so væl har, at tað kann ikki sigast við orðum.

Tá ið eg hevði verið í Himlinum eina løtu, kom Jesus til mín og segði: ”Tú mást fara niður aftur á jørðina, tí har er nakað at gera hjá tær fyri meg. Ja, tú hevur eitt stórt verk at útinna.” Eg gjørdist harmur, tí tað var so gott at vera í Himlinum; men knappliga lá eg aftur her í song míni. Og nú liggi eg bert og bíði eftir, at Jesus kemur at taka meg heim til Himmals. Hann hevur tikið allan ótta

frá mær. Nú er tað bert eitt, eg vil: Siga tað fyri øllum menniskjum, sum eg komi í samband við: **Jesus er ein veruleiki**. Tí ræður um at taka ímóti hansara innbjóðing. Nú liggi eg og gleði meg at koma heim til Himmals."

Meðan eg siti, fær myndin eitt størri umhvørvi: Tú skalt skriva hetta niður. Við skrivimaskinu tíni kanst tú náa milliónum av menniskjum. Sjálvur havi eg - seinastu tíðina – tvær ferðir verið fluttur á sjúkrahús við ongum viti. Eg ivist ikki í, at eg skuldi koma heimaftur, og at Ovi eina løtu skuldi uppliva Himmalin, fyri at vit skuldu rópa til onnur: **"Jesus Kristus er ein undurfullur veruleiki."** Nú fært tú, sum lesur hetta, kyndilin handaðan. Vilt tú handa hann víðari og rópa: **"Jesus er ein livandi veruleiki?"** Skunda tær at gera upp, so tú, ið hetta lesur, kanst vera ferðabúgvin.

Adrian Johansen

# Himmalin er opin

*Og hann segði við hann: „Sanniliga sigi eg tykkum: Tit skulu síggja himmalin opnan og einglar Guds stíga upp og stíga niður yvir menniskjusonin.“*

*Jóh. 1,52.*

Hvat var tað, sum hendi jólanátt? Var tað ikki hetta, at himmalin aftur var latin upp fyri jarðarinnar børnum? Jú, tað var júst tað. Í ártúsundir hevði verið eitt pínligt stríð millum Gud og mannaættina. Í Edens urtagarði hevði menniskjan sett seg upp ímóti Gudi og var vorðin treisk og ólýðin, og so kundu Gud og menniskjan ikki búgva saman longur. Okkara fyrstu foreldur, og við teimum øll mannaættin, vildu ikki boyggja seg fyri tí altvaldandi skaparanum, og tí mátti Gud reka tey út úr urtagarðinum. Óteljandi ferðir hevði menniskjan roynt at komið aftur til Guds; men teimum gekst sum vísindamonnunum í teirra roynd at finna Edens urtagarðin, sum umrøddur er í Bíbliuni. Teir funnu aldri tað, teir leitaðu eftir.

Í Guds urtagarði var tómt, tá ið menniskjan var rikin út. Og í kærleika sínum longdist Gudi so inniliga eftir, at alt skuldi gerast gott aftur. Men menniskjan var enn óbendilig. So birti Gud ljós og sendi einglar sínar, sum skuldu boða mannaættini, at Gudi longdist so ósigiliga nógv eftir at síggja hvørt einasta mannabarn í sínum ríki og eftir at fevna hvønn einasta syndara, og nú er Paradísportrið opið.

# Lat ikki jólini gleppa tær av hondum

*"Hvar er hin nýføddi jødakongurin?" Matt. 2,2.*

Matteus greiðir frá í sínum evangelii:

"Jesus var føddur í Betlehem … tá komu nakrir vísmenn til Jerusalem. Teir spurdu: Hvar er hin nýføddi jødakongurin? Vit hava sæð stjørnu hansara har eysturi, og vit eru komnir at tilbiðja hann. … Tá teir sóu barnið hjá Mariu, móður síni, løgdust teir á knæ og tilbóðu tað." Matt. 2,1 og 11.

Datolinjan ger tað gjørligt at flúgva úr Amerika tann 24. desember og koma til Avstralia 26. desember og á ein hátt at missa øll jólini. Men tað ber eisini til at verða heima og missa alt, av tí at endin kann verða, at tú gerst pøst, niðurundirkomin og glað um, at skjótt er alt liðugt, so tú als ikki upplivir ta gleði, jólini bera. Lat tað ikki henda fyri teg. Royn okkurt nýtt.

Savna øll tíni kæru uttan um teg og les jólaevangeliið fyri teimum, áðrenn tú kvikar tær út at keypa gávur, fyrireika veitslur ella verður púra burtur í ítróttinum í sjónvarpinum. Tað fara børn tíni at minnast. Kanska tú enntá gevur teimum ein sið, sum tey einaferð kunnu føra víðari til síni børn:

1) Sig teimum, at antin tey eru rík sum vísmenninir ella fátæk sum hirðarnir, elskar Jesus tey. Samfelagsliga fíggjarstøðan ger ongan mun, tí Jesus virðismetir okkum, sum vit eru.

2) Sig teimum, at Jesus kom og er altíð her. Orð hansara sigur: "Eg skal als ikki sleppa tær, og á ongum sinni fara frá tær," so at vit av fullum huga kunnu siga: "Harrin er hjálpari mín, eg vil ikki óttast; hvat kann mær menniskja gera?" Hebr. 13,5-6.

3) Sig teimum, at øll profetiini um fyrru komu Kristusar, eru uppfylt, og at Bíbliunnar profetiir um aðru komu hansara eru um at uppfyllast nú. Sig teimum, at tað er klókast at søkja hann, geva seg yvir til hansara, tæna honum og vera til reiðar, tá ið hann kemur.

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Hvørjum bíða vit eftir

**Rune Edvardsen**

Heldur tú, at tað var nóg mikið, tá ið Jesus rópti út í alla verðina og til andaverðina, at TAÐ ER FULLGJØRT? Restar okkurt í frá Kristusar síðu? Nei. "Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn." (Jóh. 1,12) Jesus kom ikki fyri at døma verðina, men fyri at frelsa verðina. Hann kom fyri at steðga djevulsins óndu gerningum. Av náði og við Jesu Kristi egna blóði eru vit frelst, og hann hevur goldið fyri okkum við egna lívi sínum.

Facebook kom fyri 10 árum síðani og gjørdist hvørs mans ogn fyri 7 árum síðani. HVØR Á JØRÐINI HEVUR IKKI HOYRT UM FACEBOOK Í DAG? Fleiri enn tey, sum hava hoyrt um Jesus.

Hvat sigur hetta okkum? Eg havi verið í 113 londum og ferðast á støðum, fá onnur fara til – langt inni í frumskóginum og fjarløgdum støðum. Altíð havi eg fingið cola og battaríir. Tubbaksídnaðurin hevur verið har. Men hvat við frelsuverkinum. Heimsins bestu tíðindi eru ikki komin hagar. Frelsan, bjargingin, loysnin, meiningin við lívinum er ikki boðað har. Jesus hevur lagt heimsins týdningarmestu frelsuverkætlan í hendur okkara. Hvørjum bíða vit eftir?

*Effie Campbell* umsetti.

**Sunnudagsblaðið**
*ynskir øllum eini gleðilig jól og Harrans signing í nýggja árinum!*

*Blaðstjórin.*

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74